# Trendir, sum halda á

Nógv av tí, vit hava sæð í seinastu kollektiónunum, heldur áfram í heyst og vetur. Sumt kann nýtast júst, sum vit hava gjørt, meðan okkurt er broytt eitt sindur og kryddað við nýggjum smálutum og litum.

**Langar, klænar hálsketur**

Vit hava sæð rættiliga nógv til oversize smúkkurnar í seinastuni, men hjá fleiri sniðgevum vóru smúkkurnar nú sera einfaldar, og hálsketurnar skulu vera langar og klænar.

**Tað harrakenda**

Konufólk kunnu saktans lata seg í harrakend klæði – og tað er ikki verri, um tey eru av tweed. Klædningsbuksur, skjúrtur og blazarar vóru nógv at síggja á Copenhagen Fashion Week.

**Silki**

Silkiblusur, -kjólar og -niðurdeilar. Tunt silki, sum smýgur sær um kroppin, ella tjúkt silki, sum fellir vakurt í draperingum. Silki er eitt mást í heyst og vetur, og best um tað er í klassisku litunum, hvítum, svørtum, húðlittum, gráum ella myrkabláum.

**Haremsbuksur**

Sokallaði fredsekkurin er aftur, hóast hann ikki er so síður, sum vit minnast hann frá 80'unum. Men buksurnar skulu hava hangireyv, óansæð um vit eru í chinos, jersey, denim ella silki.

**Pelsur**

Pelsur hevur verið tað heilt stóra hittið í vetur, og tað heldur á komandi vetur. Vit síggja pelsjakkar og -frakkar, húgvur, kragar, niðurdeilar, ja, alt kann vera úr pelsi, og allir litir eru loyvdir.

**Tað ráa**

Hóast sera nógv av mótanum í vetur verður eyðmerkt av tí klassiska og vakra, so heldur rái stílurin tó eisini áfram við nittum í ølum pløggum, leðrið og skrøddum denimbuksum.

**Tað bundna**

Tað bundna fekk eina endurreisn fyri nøkrum árum síðani, og tað heldur enn. Fleiri av sniðgevunum sýndu einstøk bundin pløgg.

**Klassiskir litir**

Klassisku litirnir vera eitt mást í seinna partinum av 2010 og fyrra partinum av 2011. Svart, hvítt, grátt, myrkablátt og húðlitt vera millum heitastu litirnar.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*
*Myndir: Beinta Haraldsen*


Barbara í Gongini


Rützou




Barbara í Gongini


Rützou




Rützou


Rützou